Prísupplýsingar, tá prísur verður marknaðarførdur til brúkarar

Til leiðslu og marknaðarføringsfólk hjá bilasølum

Hetta er ein kunning um marknaðarføring av prísi, nú nýggj lóggáva um endurrindan av mvg er komin í gildi.

Brúkaraumboðið umsitur lóg um marknaðarføring og hevur eftirlit við, at lógin verður hildin.

Sambært nýggjari lóggávu, ið fekk gildi tann 25. februar 2021 kann tann, sum keypir motorakfar, sum er fevnt av løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum bert nýtir ravmagn ella vetni til framdrátt, eftir umsókn fáa part av meirvirðisgjaldinum endurgoldið. Ásetingin er eisini galdandi fyri sonevnd plug-in hybrid akfør, PHEV. https://www.logir.fo/Logtingslog/19-fra-24-02-2021-um-broyting-i-logtingslog-um-meirvirdisgjald-Meirvirdisgjaldslogin

Brúkaraumboðið skal í hesum sambandi gera vart við, at sambært § 13 í lóg um marknaðarføring skal prísur, tá selt verður til brúkarar, upplýsast við mvg. Hetta merkir, at tá prísir á motorakførum fevnd av lóggávuni omanfyri verða marknaðarførdir, skulu hesir vera við mvg. Afturat hesum er møguligt eisini at vísa prísin, tá mvg´ið er endurgoldið ella at upplýsa um møguleikan at fáa mvg´ið lutvíst aftur. Prísurin við mvg skal tó síggjast týðiliga í mun til aðrar upplýsingar í marknaðarføringini.

§ 13 í lóg um marknaðarføring: Í sambandi við vinnuligt útboð av vørum til brúkarar, tó undantikið søla av vørum á uppboðssølu, skal við merking, skelting ella á annan hátt týðiliga upplýsast um samlaða prísin fyri vøruna, íroknað til dømis ómaksgjøld, útreiðslur, meirvirðisgjald, fløskupant og líknandi, umframt øll onnur avgjøld. Avgjøld ella útreiðslur, sum tann vinnurekandi ikki hevur skyldu til at krevja beinleiðis frá brúkaranum, eru ikki fevnd av 1. pkt., men skulu upplýsast fyri seg. Verða vørur bjóðaðar út elektroniskt til brúkaran við møguleika fyri at bíleggja, eru 1. og 2. pkt. eisini galdandi. https://logir.fo/Logtingslog/19-fra-08-05-2008-um-marknadarforing

Hesin teldupostur er sendur til bilasølur generelt.

Um spurningar ella ivamál eru, eru tit vælkomin at venda tykkum til Brúkaraumboðið.